# TILTØK

**Vágs kirkja**
Hósdagin 18. des. kl. 10.30 verður skúlagudstænasta í Vágs kirkju v/ Patrick de Neergaard.

**Christianskirkjan**
Hósdagin 18. des. gudstænasta fyri barnagarðsbørnum kl. 10.30.

**Havnar kirkja**
Fríggjadagin 19. desember kl. 10, Meinhard Bjartalíð, militer jólagudstænasta.

**Hoyvíkar kirkja**
Leygardagin 20. desember kl. 17: Konsert við Tarira.

**Eiðis kirkja**
Leygarkvøldið kl. 20 hevur songkvinnan Linda Andrews jólakonsert í Eiðis kirkju. Gunnar Guttesen hevur fylgispælið.

**Fuglafjarðar kirkja**
Sunnukvøldið kl. 21.00: Jólakonsert við Fuglafjarðar Sangkóri o.ø.

**Leirvíkar kirkja**
Sunnukvøldið kl. 20.00: Jólasangløta.

**4. sunnudag í advent**
***Havnar kirkja:*** Kl. 11, Bjarni Bæk
***Hoyvíkar kirkja:*** Kl 11, Lestur
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Sverri Steinhólm
***Miðvágur:*** kl. 11, David Johannesen
***Kollafjørður:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen
***Gjógv:*** kl. 12 messa, Emil Olsen
***Oyndarfjarður:*** lestur kl. 12
Selatraðar Kirkja: lestur kl. 12
***Skála:*** kl. 11, gudstænasta v/ Henning Bøgesvang. Kórið hjá Johan syngur
***Sjóvar Kirkja:*** kl. 12 gudstænasta v/ Henning Bøgesvang. Kórið hjá Johan syngur
***Fríðrikskirkja:*** kl. 11: Jákup Reinert Hansen
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10, Magnus Brahé Jørgensen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Mikladalur:*** kl. 12, Niels Pauli Danielsen, altargongd, fráfaringargudstænasta
***Kunoy:*** kl. 12, Hanus Simonsen, altargongd
***Norðoya røktarheim:*** kl 12.30, Hanus Simonsen
***Sandur:*** kl. 12: Martin Restorff Jacobsen
***Vágur:*** kl. 11, Heri Joensen
***Hov:*** kl. 12.00, barnadópur, Patrick de Neergaard

**Katólska kirkjan**
Fríggjadagin kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11: Hámessa v/ Lars Messerschmidt, presti, í Mariukirkjuni.
Eingin sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Hebron á Argjum**
Sunnudag 21. des.
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Kl. 12.00: Jólaveitsla fyri sunnudagsskúlabørnunum.
Einki møti vegna jólaveitsluna.
Einki møti jóladagarnar.
Sunnudag 28. des.
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið kl 20.00: Ongin bíbliutími
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti: Jólahugni.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti: Vit syngja jólini inn.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliutími fyri børn og bíbliugransking. Kl. 11 gudstæn., Jens V. Danielsen.

**Ebenezer**
Hósdag
kl. 16.00: Sangvenjing – Barnakórið (9 ár og yngri)
kl. 19.05: Sangvenjing – Kassia (10 ár og eldri)
kl. 20.00 Ungdómsmøti - Jólahugni
Sunnudag
kl.11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 16.30: Sangur á trappuni uttanfyri Ebenezer við barnasangkórunum
kl. 18.00 Evangeliskt møti - Familjumøti
Mánadag
kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið møti kl. 20.
Sunnukvøldið jólahugni kl. 18

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Eingin Sunnudagsskúli (byrjar aftur 4.1.09)
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræti**
Fríggjakvøldið kl 21.00 ungdómsmøti, sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/ Hendrik T. Olsen .
Mánakvøldið kl 20.00 bønarmøti.
Veri hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla
Jólaaftan kl. 15.30 jólamøti.
www.gospel.fo

**Lívdini í Hoyvíka skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21: Jólacafe við ymiskum spennandi sí, www.ung.livdin.fo
Sunnumorgunin kl. 10.30: Familju og jólamøti, henda dagin verður bert eitt møti. Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir.
www.livdin.fo

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, Evangel. møti kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgungudstænasta – Alex O'Campo talar.
Mánadagin kl. 20.00: Bønarskúlin.
Jólaaftan kl. 16.00: Jólagudstænasta
www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Sunnudagur kl 18.00: Vit syngja jólini inn Andakt v/ Brynhild Petersen Insavnan til útimissión.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 21. des. kl. 11: Morgunmøti við breyðbróting, Sí eisini heimasíðu okkara: www.saron.fo

**Missiónshúsið Libanon**
Fríggjadagin 19.12 kl. 19: Jólahugni hjá ungdómsbólkinum. Sunnudagin 21.12. kl. 16: Jólasangmøti.

**Saron Haldórsvík**
Fríggjadagin 19. des. kl. 20: Húsmøti hjá Henny Vík. Ver hjartaliga vælkomin,

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 21. des. verður jólafest fyri børn. Børn undir skúlaaldur kl 16.00.
Børn í skúlaaldri kl. 19.00
Einki møti verður sunnukvøldið 21. og 28. des.

**Jólasangløta í Kelduni í Skálafirði**
Aftur í ár skipar Keldan í Skálafirði fyri jólasangløtu tollaksmessukvøld 23 des. kl 21.
Seinastu árini hevur hetta verið eitt sera væl vitjað tiltak. Ymisk sangluttøka hevur verið og í ár koma Ecclesia, Frelsunarherurin, Zamar, Anbritt Poulsen og onnur at luttaka. Tað verða bæði sangframførðslur og nógvur felagsangur. Aftaná sangløtuna verður møguleiki at hugna sær í kaffiterianum við kaffi, køkum o.ø. Hetta plagar at verða serliga hugnaligt, har fólk sita og práta og slappa av aftaná at jólainnkeypi er liðugt. Tiltaki er ókeypis, tó verður ein innsavnan til missión og herbergi hjá Frelsunarherinum.

**Keldan í Skálafirði**
Hetta er skráin fyri tiltøk í Kelduni komandi dagarnar og um jólini:
Leygardag 20.12. kl. 21: AWAKE.
Sunnudag 21.12. kl. 11: Morgunmøti v/ Hjørdis H. Petersen.
Týsdagin 23.12. kl. 21: Vit syngja jólini inn. Hugnaligt sangkvøld við luttøku av Frelsunarherinum, Ecclesia, Zamar o.ø. innsavnan verður til nýggja herbergið hjá Frelsunarherinum. Aftaná verður drekkamunnur.
Sunnudagin 28.12. kl. 17: Veitslumøti v/ ymiskari luttøku.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 19. desember kl. 21:00: Ungdómsmøti heldur Jólaveitslu.
Sunnudagur 21. desember kl. 17:00: Møti. Kaja Lamhauge Babba missionerur í Nigeria greiðir frá sínum arbeiði.
Øll eru hjartaliga væl komin

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnudagin 18:00 Møti v/ Hjalmar Hansen

**Tabor, Toftir**
Sunnudagin
kl. 14 sunnudagsskúli
Kl. 18. Vit syngja jólini inn. Sangmøti við Tabor-kórinum o.ø.
Hjartaliga vælkomin

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnumorgun kl.10.30 Møti v/ Símun Jacobsen.
Øll hjartaliga vælkomin

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20: Ungdómsmøti, jólahugni.
Sunnudagin kl.16: Jólafest fyri børn. Onki møti

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin
kl.17.30: Bønarløta.
kl.18.00: Jólamøti. Innsavnan til Útimissión.
kl. 21.00: Ungdómsmøti.

**Getsemane Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl.20.30 er ungdómsmøti. André Matras og Jórun Bringsberg tala.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.20.00 er jólaveitsla (tekning á tel. 224482). Barna-jólaveitsla er kl. 15.00.
Hvønn gerandismorgun kl.6:15 er morgunbøn

**Saron á Viðareiði**
*Hesi møtir verða hetta vikuskiftið*
19. des., fríggjakvøld kl. 20: Ungdómsmøti.
20. des., leygarkvøld kl. 18: Uppbyggjingarmøti
21. des., sunnukvøld kl. 18: Evangelisk møti. Osvald Kjærbo, Svein Petersen, Bogi Simonsen o.fl tala og syngja.
Øll hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18 møti.
Sunnudagsskúlin er farin í jólafrí. Jólaveitslan fyri børnini verður 28. dec. kl. 17.

**Vitnið, Hvalba**
Hóskvøldið 18. desember kl. 20: Jólaløta við Suðuroyarkórinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin kl. 18.00: Ebba og Nimrod Midjord tala og syngja. Eingin sunnudagsskúli.
Týsdagin: Eingin bliutími.

**Bethel, Vágur**
Sunnudagin 21. desember kl. 17: Jólaløta við Suðuroyarkórinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hósdagin kl. 20.00: Streingjakórið.

Leygardagin kl 21.00: Jólasangløta, ymisk luttøka.
Sunnudagin kl 11.00: Morgunmøti kl 18 vit syngja jólini inn.

**Felagið Tórshavn GONGUTÚRUR**
Mánakvøldið 29. desember verður vitjað í Vestmanna kirkju kl. 19. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 18. Tilmelding á Kunningarstovuni, á tlf. 302425 ella info@visittorshavn.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*Fax 316481 · Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
***Vika 51***
***Miku- og fríggjadag kl. 15 - 15.30 fer Dánjal Húsgarð at hava fimleik fyri monnum í Tilhaldinum, byrja verður 13. feb. 2009***
Tilhaldið verður stongt ***frá 15. des. 2008 til og við 2. jan. 2009***
***Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum sigan nýttár, við tøkk fyri tað skjótt farna.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Trettandakvøldstiltakið**
á Keldu í Skálavík, sum dansifeløgini í oynni skipa fyri, verður 24. januar 2009
Nærri kunning verður seinni.

**Dagtilhaldið Fløvi Glyvrar**
Tlf. 448279
Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00.
Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.
Skrá viku 51.
Hósdagur 18. des. Opið hús.
Fríggjadagur 19. des. Opið hús.
Vit fara nú í jólafrí. Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýttár við tøkk fyri tað farna.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
Hósdagin 18. des. kl. 14.30 syngja vit jólasálmar. Hetta er somuleiðis seinasti dagur í hesum árinum. Opið verður aftur sum vant frá 5. januar 2009. *Gleðilig jól og gott nýggjár.*
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit hava opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-18 í Luffustovu.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15-18. Øll eldri eru vælkomin.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag
kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag
kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofiu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00.
Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
Mørkin Mikla 3kj
FO - 210 Sandur
Tel. 361836, fax 361256
www.visitsandoy.fo
sandinfo@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mánadag - fríggjadag kl. 13 - 16.

**Listasavnið á Sandi**
Listasavnið á Sandi er opið hvønn sunnudag kl. 14-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.